# Arvurin eftir Guðruna Sjúrðardóttur og rættarstøðan í Føroyum 1403-1407

Fróðskaparrit 70 (2024): 19-35
©The Author(s) 2024 Open Access under Creative Commons by Attribution License. Use, distribution and reproduction are unrestricted. Authors and original publication must be credited.
www.frodskapur.fo/

## The Legacy of Gudrun Sigurdardottir and the Legal Situation in the Faroe Islands 1403-1407

**Andras Mortensen**[1], *Fróðskaparsetur Føroya, Søgu- og samfelagsdeildin*

**Abstract**

In the article, the proceedings in a legal document from 1407 are compared with the provisions of the Land Law of king Magnus Lawmender from 1274. Furthermore, it is examined to what extent the document supports a hypothesis, which was based on the fragmentary source material from the time before, that the Faroe Islands and Shetland in the time after the establishment of the monarchical form of government in approx. 1280 and up to approx. 1360 was arranged as a special judicial district under Gulathing with traveling lawmen from Norway. It is shown that the letters from 1403-1405, which are reproduced in the document from 1407, are reproduced in thematic order, and that this was done to prepare the case for consideration in another judicial district, after the case had been completed in the Faroese circuit of the judicial district. Together with other hints in the content, the thematic arrangement of the document shows that in the early 15th century both the Faroe Islands and the Shetland Islands were separate circuits in the jurisdiction of the Norwegian Gulathing. Name material in the document provides indirect support for the hypothesis that lawmen from Gulathing also served in Shetland and the Faroe Islands in the 14th century. The document also shows that in 1403 a Shetlander held a high royal office in the Faroe Islands.

[1] E-mail: andrasm@setur.fo; ORCID iD 0000-0002-5819-5192

**Úrtak**

Í greinini verður málsgongdin í einum transskriptabrævi frá 1407 um arv samanborin við ásetingarnar í Landslógini frá 1274. Eisini verður kannað, í hvønn mun brævið stuðlar eini tilgiting, sum er grundað á tað ósamanhangandi keldutilfarið, sum finst úr tíðini frammanundan um, at Føroyar og Hetland í tíðini eftir at kongsstýrisskipan varð sett í verk umleið 1280 og fram til umleið 1360 vóru skipað sum eitt serstakt rættardømi undir Gulatingi við ferðandi løgmonnum haðani. Víst verður á, at brøvini, sum verða endurgivin í transskriptabrævinum og eru frá 1403-1405, verða endurgivin í evnislýsandi raðfylgju, og at hetta er gjørt fyri at fyrireika málið til viðgerð í einum øðrum rættardømi, eftir at tað var liðugt viðgjørt í tí føroyska rættardøminum. Saman við øðrum ábendingum í innihaldinum sýnir tann evnislýsandi skipanin í transskriptabrævinum, at í byrjanini av 1400-talinum vóru bæði Føroyar og Hetland egin rættardømi í Gulatings løgdømi. Navnatilfar í brævinum gevur óbeinleiðis stuðul til tilgitingina um løgmanssamband í 1300-talinum millum Gulating, Hetland og Føroyar. Eisini sýnir brævið, at í 1403 var ein hetlendingur kongligur umboðsmaður í Føroyum.

**Keywords:** Legacy of Gudrun Sigurdardottir, Faroe Islands, Shetland, Land Law of king Magnus Lawmender, right of inheritance, lawthing, jurisdiction, judical district, circuit.
**Leitorð:** Arvurin eftir Guðruna Sjúrðardóttur, Føroyar, Hetland, Landslóg Magnusar lógbøtara, Húsavíkar góðs, arvarættur, løgting, rættardømi.

## Inngangur

Tann 3. juli 1407 skrivaðu fýra menn í Havn eitt sonevnt transskriptabræv, har teir endurgóvu og sannaðu rættleikan í 6 opnum og innsiglaðum brøvum, sum vóru skrivað í tíðarskeiðinum 1403-1405. Hesi brøvini snúðu seg um eitt mál, sum hevði tikið seg upp um arvin eftir Guðruna Sjúrðardóttur í Húsavík, eftir at ein dómur var sagdur á løgtingi í Havn í 1403. Í hesum dómi var ein maður, sum æt Magnus Erlingsson, dømdur at missa jarðarognir sínar, sum í brævinum verða nevndar "Húsavíkar góðs".

Transskriptabrævið frá 1407 er varðveitt sum upprunaskjal í savninum eftir íslendska handritasavnaran, Árna Magnusson (1663-1730), sum Keypmannahavnar universitet hevur í varðveitslu (Vrieland, 2017). Brævið varð útgivið í 1847 í 1. bindi av Diplomatarium Norvegicum (DN, I: 611, 589, 590, 591, 592, 605, 606), aftur í 1907 á upprunamálinum og føroyskari týðing í Diplomatarium Færoense (Jakobsen, 1907, ss. 36–48), og seinast í enskari týðing í Shetland Documents frá 1999 (Smith et al., 1999, ss. 10–13). Tað serliga við skjalinum er eisini, at Guðrun Sjúrðardóttir, sum er arvleggjarin, sum brævið snýr seg um, tykist at vera fyrimyndin til høvuðspersónin í eini søgn, sum varð skrivað upp í Føroyum í 19. øld, nevniliga søgnina um ta ríku, men stívrendu húsfrúnna í Húsavík, sum var ríkasta kvinna, sum hevði livað í Føroyum (Hammershaimb, 1891, I: 373-376). Í brævinum verða víðfevndu ognir Guðrunar nevndar, og lítið er at ivast í, at samband er ímillum Guðruna Sjúrðardóttur og søgnina um

húsfrúnna í Húsavík, hóast søgnin snýr seg um annað enn tað, sum kemur fram í transskriptabrævinum frá 1407.

Transskriptabrævið frá 1407 er eitt skjal, sum er vorðið til í rættarskipanini í Føroyum og gevur tí innlit í hesa. Lógin, sum var galdandi um hetta mundið, var Landslóg Magnusar kongs lógbøtara frá 1274, og sambært Seyðabrævinum frá 1298 varð hon samtykt á altingi í Føroyum fyri 1280 (Mortensen, 2023, s. 36). Bæði tað avritið av Landslógini, sum nýtt varð í Føroyum, og upprunaskjalið við Seyðabrævinum eru varðveitt í Kongsbókini, sum var lógbókin hjá løgmans-embætinum í tíðarskeiðinum frá umleið 1300 til umleið 1600.

Undan brævinum frá 1407 er vitan okkara um, hvussu lógin frá 1274 varð umsitin, avmarkað til at vera grundað á ábendingar í keldutilfarinum. Hesar ábendingar eru, at tað í tíðini frá 1298 og fram til umleið 1360 kann staðfestast navnasamband millum løgmenn, sum hoyrdu til Gulating, og løgmenn í Føroyum og Hetlandi, og hetta hevur ført til eina tilgiting um, at ta fyrstu tíðina við kongs-stýrisskipan eftir Landslógini vóru hesi bæði skattlondini skipað sum eitt serstakt rættardømi í Gulatings løgdømi (Sunde, 2020, ss. 202–203). Kongs-stýrisskipan varð innførd við lóggávuni hjá Magnusi kongi lógbøtara, og undan hesi lóggávuni má roknast við, at Føroyar vórðu stýrdar privatrættarliga av staðbundnum høvdingum eins og teimum, sum vit lesa um í Føroyingasøgu (Mortensen, 2023, s. 51).

Tað varðveitta keldutilfarið er tó ov veikt til, at til ber at fáa eina váttan fyri hesi tilgiting um rættardømi; men av innskrivingum, sum løgmenn ella skrivarar í tíðliga í seinmiðøld hava skrivað inn á tey gomlu bløðini í Kongsbókini, fáast ábendingar, sum stuðla tilgitingini. Mett verður nevniliga, at tær elstu innskrivingarnar í Kongsbókina eru gjørdar í tíðini 1350-1400, og sambært teimum er tað týðiligt, at ein skipan við einum egnum løgtingi og teimum skipanum, sum Landslógin hevði um løgting, ikki varð sett í verk í Føroyum fyrr enn eina ferð í seinna helmingi av 1300-talinum. Í innskrivingunum verður tingið í Føroyum nevnt *løgting*, eins og hugtøk sum *løgmaður*, *nevndarmaður* og *løgrættumaður* verða nevnd, og tann kendasta av hesum innskrivingum er ein lønarskipan til nevndarmenn, sum teir tilnevndu tingmenninir verða nevndir, sum bendir á, at løgtingsskipanin var nýggj í Føroyum um hetta mundið.

Transskriptabrævið frá 1407 tykist so statt at vera úr eini tíð, har rættarskipanin í Føroyum nýliga var dagførd. Samstundis gevur brævið okkum fyri fyrstu ferð innlit í, hvussu tann føroyska rættarskipanin eftir Landslógini virkaði í veruleikanum. Í hesi grein verður tí spurt, hvat málið, sum verður umrøtt í brævinum, snúði seg um, og hvat tað sigur um rættarviðurskiftini í Føroyum um hetta mundið? Eisini verður spurt, um brævið á nakran hátt stuðlar tilgitingini um, at Føroyar og Hetland ta fyrstu tíðina við kongsstýrisskipan eftir Landslógini vóru skipað sum eitt serstakt rættardømi í Gulatings løgdømi við ferðandi løgmonnum haðani? Fyri at meta um spurningarnar, fari eg niðanfyri at samanbera ta rættarligu málsgongdina í brævinum við lógarkarmin, sum var galdandi.

## Málsgongdin í transskriptabrævinum

Felags fyri útgávurnar av transskriptabrævinum frá 1407 er, at tey endurgivnu brøvini eru sett eftir skjalasavnsskipan í tíðarrøð, og í tí elstu útgávuni, sum er í Diplomatarium Norvegicum, standa tey í tíðarrøð inni ímillum onnur varðveitt skjalsbrøv eftir, nær tey eru dagfest. Í skinnhandritinum frá 1407 eru brøvini tó ikki skipað í tíðarrøð, men eftir eini øðrvísi skipan, sum annaðhvørt má vera tilvildarlig ella evnislýsandi. Og tá ið ein lesur transskriptabrævið, soleiðis sum tað er skipað í skinnhandritinum, er tað týðiligt, at tann, ið setti brævið saman, hugsaði transskriptabrævið evnislýsandi heldur enn í tíðarrøð, men ikki tilvildarligt. Eg fari tí at viðgera spurningarnar omanfyri við støði í, hvussu transskriptabrævið er skipað í upprunahandritinum.

Meðan trý tey fyrstu brøvini (nr. 1-3) snúgva seg um eftirspælið til dómin, sum varð sagdur í Havn í 1403, snúgva tey trý seinnu brøvini (nr. 4-6) seg um arvin eftir Guðruna Sjúrðardóttur í Húsavík. Í transskriptabrævinum standa tey seks endurgivnu brøvini í raðfylgjuni niðanfyri og við nevndu staðfestingum og tíðarfestingum:

Evni 1
- Nr. 1: Tórshavn, 22. august 1403
- Nr. 2: Vindási (á Yell í Hetlandi), 13. oktober 1405
- Nr. 3: Papíli (á Yell), 9. november 1405

Evni 2
- Nr. 4: Viðareiði, 22. mars 1404
- Nr. 5: Húsar, 7. oktober 1403
- Nr. 6: Viðareiði, 7. september 1403

### *Evni 1: Eftirspælið til dómin um Húsavíkar góðs*

Bræv nr. 1 er dagfest í Tórshavn 22. august 1403. Í tí sæst, at málið var byrjað við einum dómi, har ein maður, sum æt Magnus Erlingsson, varð dømdur av Húsavíkar góðsi. Í brævinum bóru tveir menn, sum nevna seg við navni, fram vitnisburð um, hvat fór fram beint eftir, at dómurin var fallin, men teir nevna ikki, hvør orsøkin var til dómin.

Eftir at dómurin var fallin, hevði ein maður, sum æt Tróndur Dagfinsson, spurt Magnus Erlingsson, um hann hevði fleiri prógv ella "wisti von a" (visti sær vón um tað), men Magnus hevði svarað, at tað hevði hann ikki. Týðiligt er, at Tróndur var annar parturin í málinum, og helst skal vitnisburðurin skiljast soleiðis, at Tróndur hevði spurt tann dømda, um hann vildi kæra dómin. Spurningurin sipar týðiliga til grein 10 í tingfarabólkinum í Landslógini, sum er um, hvussu mál skuldu stevnast fyri løgmann, og hvussu tey kundu skjótast inn fyri hægri rætt. Lógargreinin er soljóðandi:

> "Nú skjýtur onkur mál sítt undan løgmanni og til Gulatings.[2] Tá skulu løgrættumenn rannsaka sakina gjølla, og um allir ikki halda úrskurðin, sum løgmaður hevur sagt, vera rættan eftir lógini, tá skulu teir ikki bróta løgmansins úrskurð, men skriva til kong, hvat teimum tykist vera sannast í málinum, og hvat rannsókn teirra hevur prógvað, tí úrskurð løgmans skal eingin maður bróta, uttan so at kongur metir, at lógbókin váttar ímóti tí ella at kongur sjálvur við ráði frá vitugum monnum metir annað vera rættari. Tí kongur er skipaður yvir lógini."(Mortensen, 2023, s. 81)

Samanborið við lógargreinina er tað skilligt í málinum, at løgmaður nú hevði sagt dóm, eftir at løgrættumenn á løgtingi høvdu rannsakað málið, og at einasti møguleiki hjá Magnusi var at kæra dómin av prinsipiellum orsøkum til kong, tí løgmansdómur var endaligur. Henda møguleika segði Magnus Erlingsson seg tó ikki vilja royna og tók við dóminum, sum var, at hann skuldi missa Húsavíkar góðs.

Í vitnisburðinum sæst ikki, hvør leikluturin hjá Tróndi Dagfinssyni hevði verið í rættarganginum, men av brævi nr. 2 sæst, at hann var lógsøkjari. Tað var hann, sum hevði reist eitt krav ímóti Magnusi og skuldi hava virðini, sum vóru dømd av Magnusi. Men av brævi nr. 1 skilst eisini, at hetta ikki var tann einasti leikluturin, sum Tróndur hevði í tí almennu rættarskipanini, og fyri alt tað heldur ikki Magnus sjálvur, tí tá ið Magnus hevði svarað, at hann ikki fór at kæra málið, hevði Tróndur spurt Magnus soleiðis:

> "en han sa nokuæria si*n*na foreseman j þi vmbodi sem han [Þrondr] hafdi af erlend þhilipuss*yni ok* magnus erlingss*yni* en nefndr magnus huast hana einga wita *ok* gaf oppt nefndu*m* þrond allunghis huitan *ok* lidugugan vm fyr sakt wmbod bodi af sinum wegnat *ok* erlends."
> (AM Dipl. Norv. fasc. C, 1a, regla 4-5)

> "um hann helt, at Tróndur hevði forsømt tað umboð, sum hann hevði av Erlendi Filippussyni og Magnusi Erlingssyni, men Magnus segði seg einki vita um tað og gav Tróndi fulla kvittan og frítøku viðvíkjandi nevnda umboði bæði vegna seg og Erlend."

Vit hoyra her um eitt umboðandi starv, sum Tróndur hevði havt frá einum Erlendi Filippussyni og Magnusi sjálvum. Úr øðrum keldum úr samtíðini vita vit, at Erlendur Filippusson var fæhirði (skattmeistari) kongs í Bergen (Bjørkvik & Salvesen, 2024), og hetta samband sýnir, at Tróndur og Magnus ikki bara vóru tveir tilvildarligir menn, sum lógu í sak við hvønn annan, men at teir báðir røktu størv fyri fæhirðan í Bergen, har Magnus, sum hevði fingið dóm, stóð yvir Tróndi

[2] Roknast má við, at føroyingar hava fatað hugtakið "Gula þing" her sum heiti á løgtinginum í Tórshavn. Fremst í Løgtings- og Vártingsbókini fyri 1655-66 er skrivað ein siðbundin tala hjá løgmanni, har tingferðin hjá føroyingum til løgtingið í Tórshavn hátíðarliga verður nevnd "gulatingsferð", sí (Mortensen, 2023, s. 19).

í tign. Í vitnisburðinum verður sagt, at Magnus skrivliga váttaði, at Tróndur ikki hevði misrøkt umboðsmansstarv sítt og loysti Trónd frá tí. Men hvat innihaldið í hesum umboðsmansstørvum hevði verið, er ilt at gita. Helst skal hetta skiljast soleiðis, at Magnus Erlingsson, sum hevði fingið dóm, var fúti fyri fæhirða kongs, og at Tróndur Dagfinsson annaðhvørt var ein av tænastumonnum fútans, tvs. lensmaður, sum í samtíðini var nevndur *sýslumaður*, ella umboð fyri fæhirðan í Bergen í einum privatum máli, sum ikki kom skattmeistarastarvi fæhirðans við. Skilligt er, at hetta ikki hevði verið eitt vanligt rættarmál, men eitt rættarmál, sum fór fram millum fólk á teimum ovastu rókunum í samfelagnum.

Sambært brævi nr. 1 gav Magnus seg púra upp, at her var einki at leggja fyri kong, og síðan greiða vitnini soleiðis frá avtaluni, sum Magnus og Tróndur gjørdu ístaðin:

> "helldr gaf h*a*n oppt nefnd*u*m þrond alla þa til tolu *ok* akeru s*e*m a fyr sagdu husauiks godsi ku*nn*e werda h*anu*m *ok* h*a*ns erfui*nn*gium f*y*r sina armædi *ok* goduili er h*a*n þottist af h*anu*m fi*nn*a ollu til tiknu en eingu wnda skilldu." (AM Dipl. Norv. fasc. C, 1a, regla 5-6)

> "Harafturímóti gav hann Tróndi og arvingum hansara alla ta tiltalu og ákæru, sum kundi koma at vera á Húsavíkar góðsi fyri hansara ómak og tann góðvilja, sum hann tóktist at kenna frá honum, alt tikið við og einki undanskilt."

Magnus læt Trónd fáa Húsavíkargóðsið, og meira verður ikki sagt um tað, ivaleyst tí hetta stóð í dómsbrævinum, sum verður nevnt, og var ikki viðkomandi her. Hans Jacob Debes metti, at Tróndur hevði umboðað fæhirðan í einum skuldarmáli ímóti Magnusi, og at hetta málið hevði samband við eitt annað skuldarmál, sum vit kenna úr einum brævi frá 1399 (Jakobsen, 1907, ss. 31–35), har sýslumaður kongs í Føroyum, Greipur Ívarson, sum hevði Føroyar í len og búði í Hattabergi í Noregi, skuldarbant seg í sambandi við eitt skipakeyp (Debes, 1995, ss. 118–119). Um júst hetta málið var orsøkin til dómin, ber ikki til at ávísa, men hugsandi er, at tað var eitt mál um miseydnaðar íløgur, sum lá til grund, har Húsavíkargóðsið stóð í veð.

Hvør tað var, sum hevði veðsett Húsavíkargóðsið, verður ikki nevnt í brævinum frá 1407, men við støði í, at bæði Magnus og móðir hansara sambært brævi nr. 1 og 2 treytaleyst boygdu seg fyri krøvum Tróndar, er mest sannlíkt, at talan var um veðskuld, sum stavaði úr miseydnaðum íløgum hjá Arnbjørn Gudleikssyni, og sum arvingin, sum vit hoyra um í brævi nr. 2, og arvingarnir undan henni høvdu arvað uttan at vita av skuldini. Um hetta var so, hevur dómurin í 1403, sum førdi til tað rættarliga virksemið, sum verður umrøtt í transskriptabrævinum frá 1407, verið grundaður í grein 17 í arvabólkinum í Landslógini, sum er um eina tílíka støðu. Henda lógargreinin ljóðar soleiðis:

> "Nú situr ein maður í arvi og krevur dóm fyri at fáa hann út, og ein annar sigur seg hava rætt til arvin. Tá skal tann síðst nevndi stevna

> manninum heima eftir lógini og krevja arvin og at hann flytur haðani. Nú vil maðurin ikki flyta, tá skal tann arvborni stevna honum til tings fyri rán og fyri nevnd. Og um saksgongd og vitnisføring verður mett honum fullgóð fyri mál hansara, og tað ikki koma andvitni ímóti, tá eiga tingmenn at døma honum arvin, og hin skal gjalda seks oyrar í silvuri til kong fyri tað, at hann legði dóm fyri tann arv, sum hann ikki átti. Nú vil maðurin ikki fara, tá skal tann arvborni fáa við sær so nógvar tingmenn, sum hann vil, fyri at fáa hann út úr arvi sínum, og ein og hvør, sum noktar at fara við, er sekur ein oyra í silvuri til kong. Nú koma teir hagar, og hann verjir seg við oddi og egg, tá er hann sekur 10 merkur í silvuri til kong, og hvør teirra, sum veitir honum forsvar, seks oyrar. Nú berjast teir, tá fellur hvør í útlegd, sum stendur fyri tí frádømda arvinum, men hinir, sum søkja til, eru friðhalgir."(Mortensen, 2023, s. 199)

Í brævi nr. 2 hitta vit teir báðar, Magnus og Trónd, í Hetlandi á garðinum hjá móður Magnusar, Ragnhild Hávarðsdóttir, sum búði á Setri á Yell. Brævið er dagfest 13. oktober 1405 á Vindási á Yell, og sambært brævinum váttaði hon,

> "at hon hafdi fingid magnus syni sinum sitt fullt *ok* lagligt wmbod wm allt þat gods *ok* penin*g*ha sem var eft*ir* gudrunu siughrdar dott*ur* j Husawik". (AM Dipl. Norv. fasc. C, 1a, regla 7-8)

> "at hon hevði fingið Magnusi, soni sínum, fult og løgligt umboð um alt tað góðs og fæ, sum var eftir Guðruna Sjúrðardóttur í Húsavík."

Av hesum skilst, at Magnus var hetlendingur, og eisini, at hann ikki átti ognirnar, sum hann var dømdur at missa, men harafturímóti móðir hansara. Hvussu móðir hansara, Ragnhild, hevði arvað Guðruna Sjúrðardóttur í Húsavík, verður greinað niðanfyri í sambandi við evni 2.

Á stevnuni, sum Tróndur Dagfinsson hevði við Ragnhild Hávarðsdóttur, har eisini sonurin Magnus var hjástaddur, hevði Tróndur eisini kunngjørt fyri henni, at Magnus

> "hafdi lagt vpp med seg *ok* sina erfuinghia til efuendligrar eignar alla þa akeru *ok* til tolu sem h*a*n matti vi*n*na vm allt þat gods sem var j feræyum eft*ir* gudrunu siurdar dott*ur* j Husa vik". (AM Dipl. Norv. fasc. C, 1a, regla 8-9)

> "hevði latið honum og arvingum hans upp í hendur til ævinligar ognar alla ta ákæru og tiltalu, sum hann kundi vinna sær um alt tað góðs, sum var í Føroyum eftir Guðruna Sjúrðardóttur í Húsavík".

Magnus váttaði á stevnuni, at hetta var rætt, og Tróndur spurdi tá Ragnhild, um hon tók undir við tí skrivligu avtaluni, sum Magnus og hann høvdu gjørt. Ragnhild svaraði, at tað gjørdi hon og rætti Tróndi hondina sum tekin um hetta.

Í brævi nr. 3, sum er dagfest ein knappan mánað seinni, tann 9. november 1405 í Papil í Hetlandi, vátta sóknarpresturin á Yell, Hetlands løgmaður og ein løgsøgumaður, at Ragnhild ikki var "fletgingin", tvs. hevði fullan myndugleika og ráddi sjálv fyri ognum sínum, tá ið hon góðtók avtaluna, sum sonurin hevði gjørt við Trónd. Vitnini váttaðu so statt, at góðtøka hennara hevði fult gildi.

Sæð í ljósinum av, at Magnus Erlingsson ikki var formligur eigari av Húsavíkar góðsi, men harafturímóti móðir hansara í Hetlandi, tykist tað margháttligt, at rættarskipanin í Føroyum hevði dømt hann frá góðsinum. Hetta var tó í fullum samsvari við Landslógina, har tað í grein 17 í landbrigdabólkinum, sum er um skifti av ognarjørð við óðalsrætti, millum annað varð skipað, at ein jørðeigari, sum búði uttanlands, skuldi hava ein umboðsmann fyri seg í rættardøminum, og umboðsmaðurin kundi geva umboðið víðari til hvønn, hann vildi, við sama rætti sum jørðeigarin sjálvur (Mortensen, 2023, s. 223). Óðalsrættur verður gjølla skilmarkaður í landabrigdabólkinum, og fýra sløg av jørð kundu vera óðalsjørð. Høvuðsreglan var, at jørð, sum hevði ligið undir somu ætt í 60 ár, kundi eingin loysa undan einum manni, men eisini jørð, sum kongur hevði givið einum manni treytaleyst, skuldi roknast sum óðalsjørð. Tað triðja slagið var jørð, sum fýra ættarlið í beinleiðis linju høvdu átt uttan slit, og tað fjórða slagið var óðalsjørð, sum skyldfólk skiftu ímillum sín.

Tað er týðiligt, at tað var eftir leiðbeining úr hesi lógargreinini, at teir báðir, Magnus sum umboðsmaður fyri eigaran og Tróndur sum kravánari, fóru til Hetlands í 1405. Tað var fyri at fáa viðurkenning eigarans av avtaluni, sum teir høvdu gjørt, og í hesum førinum var umboðsmaðurin eisini arvingi til ognirnar, sum hann umboðaði. Um hann var einasti arvingi, vita vit kortini ikki.

Tá ið tað í brævi nr. 2 stendur, at Magnus hevði givið Tróndi og arvingum hansara "til ævinligar ognar alla ta ákæru og tiltalu, sum hann kundi vinna sær", var hetta helst við teirri merking, at ættin hjá Ragnhild ikki skuldi hava forkeypsrætt, um ognirnar seinni vórðu settar til sølu. Sambært grein 12 í landabrigdabólkinum kundi ein selja óðalsjørð sína til at veðseta og loysa aftur seinni (Mortensen, 2023, s. 219), og hetta bendir á, at hóast jørðin, sum Ragnhild hevði arvað, var ognarjørð, so var hon ikki jørð við óðalsrætti av teirri orsøk, at hon hevði verið í ættini í minni enn 60 ár. Hetta bendir á, at Húsavíkargóðsið hjá Arnbjørn Gudleikssyni var savnað eftir svartadeyða, sum rakti Føroyar í 1349 (Storm, 1888, ss. 224, 275, 404), og at Arnbjørn hevði keypt seg til jarðarognir sínar í Sandoy og ikki arvað tær. Hetta kann verða sett í samband við søgn á mannamunni, sum varð niðurskrivað í 19. øld um, at Húsavík doyði út av svartadeyða og varð bygd aftur av einum manni, sum æt Nevur, ið kongur hevði sent úr Noregi (Jakobsen, 1972, s. 46). Í 1403 vóru færri enn 60 ár liðin, síðan Føroyar fyrstu ferð vórðu raktar av umfarsjúkuni.

Samanumtikið vísa tey trý fyrstu brøvini, at ein hetlendingur, sum var umboðsmaður í Føroyum fyri fæhirða kongs, í 1403 varð dømdur at missa Húsavíkar góðs, sum hann umsat fyri móður sína í Hetlandi, og at hon hevði arvað hesar ognir frá Guðrun Sjúrðardóttur. Ein annar umboðsmaður hjá fæhirða

kongs hevði verið lógsøkjari í rættarmálinum, og tað var eisini hann, sum skuldi yvirtaka Húsavíkargóðsið, annaðhvørt sum kravánari vegna seg sjálvan ella vegna tann, sum hann umboðaði, nevniliga ein mann, sum vit eisini kenna sum fæhirða kongs. Tá ið innihaldið í brøvunum verður samanborið við Landslógina, geva brøvini eina fatan av, at Húsavíkargóðsið var dømt av arvingunum hjá Guðrun sum gjald fyri veðskuld, sum hevði verið við í arvinum, uttan at arvingarnir, hvørki Ragnhild í Hetlandi, Guðrun í Húsavík undan henni, ella børn Guðrunar, sum høvdu arvað undan móðurini, vistu av tí.

## *Evni 2: Arvurin eftir Guðruna Sjúrðardóttur*

Hitt evnið í transskriptabrævinum er um arvin eftir Guðruna Sjúrðardóttur í Húsavík. Tey trý brøvini sýna, at eftir at dómur var fallin í 1403, varð farið undir at staðfesta, hvat hesin arvur fevndi um. Vitnisbrøvini eru frá á heysti 1403 til á vári 1404, men týðiligt er, at tey tilvitað eru býtt upp evnislýsandi við tí yngsta fyrst, síðan tí næstyngsta og tí elsta síðst.

Í brævi nr. 4, sum er dagfest 22. mars 1404 á Viðareiði, verður staðfest, hvat Húsavíkargóðsið fevndi um, nevniliga hetta:

> “husa wik *ok* dal so mykit sæm til Husa vik la *ok* j Skala wik *ok* j Skarfua nesi *ok* sa*n*nde so mykit sem vndir husavik hefu*ir* legid“. (AM Dipl. Norv. fasc. C, 1a, regla 15)
>
> “Húsavík og Dal, so mikið sum lá til Húsavík, og í Skálavík, á Skarvanesi og Sandi so mikið, sum hevur ligið undir Húsavík”.

Við støði í hesum upplýsingum kann verða mett, at Húsavíkargóðsið í minsta lagi hevur fevnt um tær jarðarognirnar í nevndu bygdum, sum enn eru ognarjørð. Í talvu 1 sæst yvirlit yvir ognarbýtið av høgunum kring Húsavík. Út frá hesum kann verða mett, at Húsavíkargóðsið í minsta lagi hevur verið umleið 77 merkur og havt eina vídd upp á umleið 35 km$^2$, umframt ta jørð í økinum, sum seinni hevur skift ognarstøðu til at vera kirkjujørð ella kongsjørð. Mett út frá jarðarbókini frá 1584 hevur Húsavíkargóðsið havt umleið 17 leigugarðar undir sær í Húsavík, Skálavík, Dali og á Skarvanesi og Sandi (Mortensen, 2021, s. 72).

Eisini verður í kelduni víst á, hvussu hetta góðsið var endað í arvinum eftir Guðruna Sjúrðardóttur. Greitt verður frá, at Guðrun, sum var dóttir Sjúrð hjalt í Finngarðinum í Bergen, hevði verið gift við Arnbjørn Gudleikssyni, og at tey áttu ein skilgitnan son, sum æt Sjúrður, sum arvaði Arnbjørn. Tey áttu eisini eina skilgitna dóttur, sum sambært brævi nr. 5 æt Arnóra, og tá ið Sjúrður doyði, arvaði hon bróðurin. Men tá ið hon eisini doyði, arvaði móðirin hana. Hugtakið “skilgitin”, sum verður nýtt, er úr Landslógini og merkir, at tey vórðu fødd í hjúnalagi.

Talva 1
Húsavíkargóðsið (ringurin), sum Guðrun Sjúrðardóttir arvaði eftir dóttur sína, Arnóru, sum arvaði tað frá bróður sínum, Sjúrði, sum hevði arvað frá faðir sínum, Arnbjørn Gudleikssyni, sum var giftur við Guðrun.




Henda arvagongd samsvarar við arvaflokkingina í arvabólkinum í Landslógini. Í grein 7 í arvabólkinum verður arvaflokkatalið lýst, har talið av arvingum verður greinað, hvør arvingi eftir annan í 13 arvaflokkum, og eftir 1. arvaflokki arvaðu skilgitin børn faðir og móður, har bróðir arvaði tað dupulta sum systir, og tann elsti arvaði høvuðsbólið, og síðan arvaðu børn teirra. Bæði Sjúrður og Arnóra doyðu barnleys, og í 3. arvaflokki verður skipað, at um hetta var førið, skuldi móðirin arva barnið (Mortensen, 2023, s. 180).

Hví Ragnhild Hávarðsdóttir í Hetlandi hevði arvað Guðrun í Húsavík, fáa vit eisini eina fatan av í arvabólkinum í Landslógini, nevniliga arvaflokkunum eftir 3. flokk, sum greina, hvør arvaði, tá ið eingin arvingi var eftir, sum var ættaður frá arvleggjara í beinari linju. Tann, sum í 4. arvaflokki stóð fyrstur til at arva, var faðirbróður, síðan bróðursonur, síðan sammøðra bróður, síðan faðirsystir og síðst bróðurdóttir (Mortensen, 2023, s. 184), sí talvu 3. Transskriptabrævið frá 1407 gevur eina fatan av, at Guðrun Sjúrðardóttir hevði arvað allar ognir faðirs sín og so statt, at Sjúrður hjalt í Finngarðinum ikki hevði aðrar lívsarvingar enn hana. Sjálv hevði Guðrun ongar lívsarvingar longur, tá ið hon doyði, tí bæði sonurin og dóttirin doyðu barnleys undan henni. Undir hesum umstøðum er arvurin eftir Guðruna farin út í 4. arvaflokk, og Ragnhild Hávarðsdóttir má hava

verið faðirsystir hennara. Hetta samsvarar eisini við, at hjánavnið hjá Sjúrði er "hjalt", sum merkir, at hann var úr Hetlandi. Helst var hetta eisini orsøkin til, at Guðrun sambært vitnisburðinum hjá Arnóru í brævi nr. 5 hevði havt inntøkur av jarðarogn í Hetlandi. Sjúrður hjalt má tí eins og systirin hava verið nevndur við faðirsnavninum sum sonur Hávarð, men hetta vendi eg aftur til seinni.

Meðan bræv nr. 4 snúði seg um, hvussu Húsavíkargóðsið var vorðið ein partur av tí samlaða arvinum eftir Guðruna Sjúrðardóttur, snúgva bræv nr. 5 og 6 seg um, hvørji onnur virði vóru í arvinum eftir hana, og júst í hesum evnislýsandi uppbýtinum sæst, hvat málið í grundini snúði seg um.

Í brævi nr. 5, sum er dagfest 7. oktober 1403 á Húsum, geva tveir menn, har annar var prestur, vitnisburð um, hvat teir høvdu hoyrt Arnóru, sum Guðrun arvaði, men sum nú var deyð, siga um, hvørji virði í búnum eftir Arnbjørn Gudleiksson vóru ogn hjá móðurini. Tey vóru allur Finngarðurin og hálvur Brattin í Bergen, tvs. umleið tríggjar av teimum longu húsarøðunum, sum enn standa á Bryggjuni í Bergen, og ymist leysafæ, sum verður nevnt. Eisini hevði Arnóra sagt, at móðirin átti jørð í Hetlandi, sum hon hevði leiguinntøkur av, men hvussu mikið, mintist hon ikki. Teir báðir menninir, sum skrivaðu vitnisbrævið, váttaðu við innsiglum sínum, at teir høvdu verið hjástaddir, tá ið Arnóra vitnaði og svór fullan bókareið um hetta, tvs. við hondini á Bíbliuni.

Í brævi nr. 6, sum er dagfest 7. september 1403 á Viðareiði, gera tveir menn, sum nevna seg, kunnigt, at teir vóru hjástaddir, tá ið ein kvinna, sum æt Ingirid Oyvindardóttir, við vitnisburði og fullum bókareiði greinaði, hvørji virði í búnum eftir Arnbjørn Gudleiksson vóru ogn hjá Guðrun Sjúrðardóttur, sí talvu 2.

Innihaldið í brøvunum sýnir, at brøvini standa í eini raðfylgju, har tað galt um at sýna eina ávísa málsgongd fyri at fremja, at málið varð hóskandi upplýst. Samanumtikið sæst í teimum trimum brøvunum, at tað fyrst snúði seg um at staðfesta, hvørji virði í búnum vóru arvur, sum Arnóra, dóttir Guðrunar, hevði arvað frá bróðrinum og faðirinum. Síðan snúði tað seg um at staðfesta, hvat Arnóra, sum var deyð, og ein kvinna á Viðareiði, sum enn var á lívi, høvdu sagt um, hvørji virði í búnum eftir Arnbjørn Gudleiksson høvdu verið ogn hjá Guðrun, av tí at talan var um virði, sum Guðrun hevði arvað eftir faðir sín, Sjúrði hjalt í Finngarðinum í Bergen. Tað snúði seg so statt um at vísa á, at ein partur av virðunum, sum Arnbjørn Gudleiksson hevði átt, vóru serogn hjá Guðrun Sjúrðardóttur og hoyrdu tí ikki til Húsavíkargóðsið.

Hetta samsvarar við grein 3 arvabólkinum í Landslógini, sum er um felagsgerð í hjúnalagnum:

> "Tey kunnu leggja felag soleiðis, at hvør teirra leggur til felags alt, sum tann eigur, og tað, sum tey fara at eiga gjøgnum arv og á annan hátt. [...] Tað av hjúnunum, sum legði meira í felagið, skal taka tað meira burtur úr tí, ella arvingar tess, og síðan verður skift í tveir helmingar, hóast tað er minkað." (Mortensen, 2023, s. 175)

Talva 2
Arvurin hjá Guðrun Sjúrðardóttur eftir faðir sín, Sjúrð hjalt í Finngarðinum, sambært vitnisburðinum hjá Ingirid Oyvindardóttur á Viðareiði.

- Allur Finngarðurin í Bergen, sum taldi 15 hús og 68 stovur.
- Tveir lutir í Brattinum í Bergen, men hvussu mong hús hon átti har, visti vitnið ikki.
- Tríggir garðar á Rossalandsstrond (í Rogalandi?), sum itu Løðufjall, á Mýri og Leiti.
- 10 leypaból í Rogalandi.
- Jarðarognir í Hetlandi, har leiguúrtøkan var 46 skillingar um árið.
- 6 sengur við dúnkoddum og dýnum við gásafjøður.
- Eitt diadem til virði av 13 oyrum.
- Eitt talnaband av silvuri.
- Tríggjar fingurringar úr gulli.
- Ein skjaldabúnaður.
- Tvey silvurker og eitt stættaker av silvuri.
- Tríggir møtlar við skinnum og tilhoyrandi kyrtlum.
- Eitt "syrkot"(eitt klædnaplagg at hava útyvir, sbr. navnið "kot" seinni um ein stuttan frakka).
- Tveir húsbúnaðir (møblar), annar til stovuna og annar til sjóvarloftið.
- Ein ketil (kókikar), ið tók seks tunnur.
- Øll ølílát og kannur og diskar og pottar og onnur kókingaramboð, sum vitnið ikki mintist, hvussu mong, ið vóru.
- Ein stór silvursilgja.

Harumframt helt vitnið seg vita, men tordi ikki at svørja eið á Bíbliuni um tað, at Guðrun eisini hevði átt

- Eitt sparlak av reyðum og grønum silki.
- 10 leypaból í Sogn.

Lítið er at ivast í, at tað var henda greinin í Landslógini, sum lá til grund fyri fundarvirkseminum á Húsum og Viðareiði á heysti 1403 og vári 1404, tá ið vitnisbrøv vórðu skrivað fyri at lýsa, hvussu arvurin eftir Guðruna Sjúrðardóttur løgfrøðiliga var samansettur. Og tá ið orsøkin til fundarvirksemið var dómurin á løgtingi í 1403, er heldur ikki torført at rokna út, hvør stóð aftanfyri. Mest at vinna hevði Ragnhild Hávarðsdóttir í Hetlandi og sonur og arvingi hennara, Magnus Erlingsson, sum umboðaði jarðarognir hennara í Føroyum. Tá ið transskriptabrævið frá 1407 verður lisið sum ein evnislýsandi heild, avdúkar tað tí eina ætlan hjá teimum báðum hetlendingunum, móður og soni, at sleppa undan at missa meira enn neyðugt av tí skuldarbundna arvinum úr Føroyum eftir múgvandi skyldkonu teirra, Guðruna Sjúrðardóttur í Húsavík.

## Rættarviðurskiftini í Føroyum í 1407

Annar partur av spurninginum var, hvat brævið frá 1407 sigur um rættarskipanina í Føroyum um hetta mundið, og um brævið stuðlar tilgitingina um, at Føroyar og Hetland ta fyrstu tíðina við kongsstýrisskipan eftir Landslógini og fram til einaferð í seinnu helvt av 1300-talinum vóru skipað sum eitt serstakt rættardømi í Gulatings løgdømi við ferðandi løgmonnum haðani?

Brævið váttar ikki beinleiðis tilgitingina um eitt felags rættardømi, men sýnir harafturímóti, at í byrjanini av 1400-talinum vóru bæði mentanarligt og rættarligt samband millum tey bæði skattlondini. Ein kvinna í Hetlandi arvaði Húsavíkargóðsið frá eini skyldkonu í Føroyum, sum var dóttir ein ríkan hetlending, ið hevði ognir og virksemi á Bryggjuni í Bergen og átti eisini jørð ymsastaðni í Noregi og Hetlandi. Líkt er eisini til, at sonur ta hetlendsku

Talva 3

Fýra teir fyrstu av teimum 13 arvaflokkunum í arvabólkinum í Landslógini. Um Arnbjørn Gudleiksson verður settur sum arvleggjari, sæst, at Sjúrður Arnbjørnarson og Arnóra Arnbjørnardóttir vóru 1. arvingar í 1. arvaflokki og Guðrun Sjúrðardóttir 3. arvingi í 3. arvaflokki. Um Guðrun Sjúrðardóttir verður sett sum arvleggjari, sæst, at Ragnhild Hávarðsdóttir á Yell í Hetlandi má hava arvað hana sum 4. arvingi í 4. arvaflokki og verið faðirsystir hennara, har faðirin hevði fingið hana við somu konu.

| **Arvleggjari** | **1. arvaflokkur** | **2. arvaflokkur** | **3. arvaflokkur** | **4. arvaflokkur** |
|---|---|---|---|---|
| **1. arvingi** | Børn (skilgitin) | Ættleiðingur | Bróðir (samfedraður og skilgitin) | Faðirbróðir (samfedraður og skilgitin + faðir skilgitin) |
| **2. arvingi** | Sonarsonur (skilgitin og skilgitnan faðir) | Sonarsonur (skilgitin og faðirin frillusonur) | Systir (samfedrað og skilgitin) | Bróðursonur (samfedraður og skilgitin + faðir skilgitin) |
| **3. arvingi** | | Sonardóttir (skilgitin) | Móðir (lógliga gift) | Bróður sammøðra (skilgitin + móðir skilgitin) |
| **4. arvingi** | | Dóttursonur (skilgitna móður) | Frillusonar-dóttir (skilgitin) | Faðirsystir (samfedrað og skilgitin) |
| **5. arvingi** | | | Frilludóttur-sonur (skilgitin) | Bróðurdóttir (samfedrað og skilgitin + undan samfedraðum bróður og sammøðra systur skilgitin) |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **6. arvingi** | | | Dótturdóttir (skilgitin) | ⬇ |
| **7. arvingi** | | | Móðurfaðir (skilgitin) | (o.s.fr. til 13. arvaflokk, har tann næstsíðsti arvingin var fermenningur og tann 9. og síðsti arvingin var kongur). |
| **8. arvingi** | | | Faðirsmóðir (skilgitin) | |
| **9. arvingi** | | | Móðurmóðir (lógliga gift) | |

kvinnuna, sum umsat Húsavíkargóðsið fyri hana, eisini hevði eitt høgt starv í tí kongligu umsitingini av Føroyum, eftir umrøðuni at døma sum fúti hjá fæhirða kongs.

Eisini sæst í transskriptabrævinum frá 1407, at Føroyar og Hetland nú vóru skipað undir hvør sínum løgmanni. Í brævi nr. 3 verður ein staðbundin løgmaður nevndur í Hetlandi, og hóast eingin løgmaður verður nevndur í Føroyum í transskriptabrævinum, so sæst í einum varðveittum brævi frá 1412 (Jakobsen, 1907, ss. 49–52), at eisini Føroyar høvdu ein staðbundan løgmann í byrjanini av 1400-talinum. Hesi brøvini sýna sostatt, at bæði Hetland og Føroyar nú vóru egin rættardømi og ikki longur eitt serstakt rættardømi undir Gulatingi, sum varð røkt av gulatingsløgmonnum, eins og Seyðabrævið frá 1298 og keldutilfarið úr Hetlandi fram til umleið 1360 bendir á.

Eina óbeinleiðis ábending um, at ein tílík broyting nýliga hevði verið, fáa vit tó av faðirsnavninum hjá Ragnhild Hávarðsdóttur og bróðrinum, Sjúrði við hjánavninum “hjalt”. At meta eftir lógarásetingini, sum Ragnhild má hava arvað eftir, vóru tey bæði samfedrað (høvdu sama faðir) og skilgitin systkin, og so statt má Sjúrður eisini hava verið nevndur við faðirsnavninum *Hávarðsson*. Hvørki Sjúrður hjalt ella systirin eru nevnd í øðrum varðveittum miðaldarbrøvum, men í mun til tilgitingina um, at gulatingsløgmenn tóku sær av Hetlandi og Føroyum í 14. øld, er tað viðkomandi at nevna, at í einum varðveittum dómsbrævi frá 1383 er ein Hávarður Sigurðsson, løgmaður í Ryggjafylki, nevndur sum dómari (DN, I: 476). Hann var so statt ein av løgmonnunum í Gulatings løgdømi, og bæði fornavn og faðirsnavn hansara benda á, at Sjúrður hjalt Hávarðsson í Finngarðinum var sonur hansara og uppkallaður eftir abba sínum. Hugsandi er tí, at løgmanssamband var orsøk til, at Guðrun giftist við tí múgvandi Arnbjørn Gudleikssyni, sum upprunaliga átti Húsavíkargóðsið.

Sæð í mun til eldri skjøl sýnir transskriptabrævið frá 1407 eisini eina broyting í, hvussu tað kongliga stýrið var skipað í nærøkjunum í Føroyum. Ein av teimum fýra, sum settu innsigli sítt undir brævið, var “sýslumaður í Suðuroy”, og hetta sýnir, at Føroyar nú vóru býttar upp í smærri umsitingarøki, sum staðbundnir hjálparmenn hjá lensharranum røktu, og at hesir eins og lensharrin sjálvur formliga vórðu nevndir *sýslumenn*. Hetta starvsheitið svaraði eisini til

starvsheitið *lensmaður*, sum verður nýtt í fylgibrævinum til lógina, sum Magnus kongur lógbøtari sendi til Føroya í 1271, har kongur lovaði, at sýslumaður ikki skuldi hava fleiri enn tveir lensmenn í landinum. Við hesum brævinum varð Gulatingslógin frá 1267 sett í gildi í Føroyum, og harvið eisini kongsstýrisskipanin, sum fekk sín endaliga form við Landslógini frá 1274, ið varð samtykt av altingi í Føroyum fyri 1280.

Afturat hesum er tað týðiligt í transskriptabrævinum frá 1407, at tað varð skrivað fyri at bera málið víðari í rættarskipanini. Tann evnislýsandi skipanin sýnir, at endamálið við teimum trimum fyrstu brøvunum var at vátta, at eftir dómin á løgtingi í Havn í 1403 høvdu lógsøkti og lógsøkjari gjørt semju um Húsavíkargóðsið, sum var arvur eftir Guðruna Sjúrðardóttur, og at endamálið við teimum trimum seinnu brøvunum var at vátta, at arvurin eftir Guðruna eisini fevndi um serogn hjá henni, sum ikki var umfatað av dóminum í 1403.

Verður samanborið við Landslógina, sæst, at hetta var í fullum samsvari við grein 16 í arvabólkinum, sum ásetti soleiðis:

> “Arvur skal søkjast í tí fylkinum, har arvleggjari er deyður. Um arvingin leiðir vitnini til eitt annað fylki, enn arvleggjarin doyði ella eftir býmanna lógum, tá hevur hann søplað sær arvin. Alt, sum er hent í býnum, skal søkjast eftir býmanna rætti, og alt, sum er hent í heraði ella er farið fram millum heraðsmenn og býarmenn, tað skal alt søkjast eftir heraðs rætti.”(Mortensen, 2023, s. 199)

Ásetingin ger tað týðiligt, at í 1407 var málið, sum verður upplýst og váttað í transskriptabrævinum, avgreitt í Føroyum. Húsavíkargóðsið hevði skift eigara sum gjald fyri veðskuld, og nú snúði tað seg um tann partin av arvinum, sum Guðrun hevði arvað frá faðir sínum og lagt í felag í hjúnalagnum við Arnbjørn Gudleiksson. Veðskuldin hevur helst verið størri enn virðið á Húsavíkargóðsinum, og lógsøkjari hevur roynt at fáa fatur í meira. Men týðiligt er, at lógsøkti hevur hildið uppá, at serognin hjá Guðrun einki hevði við trotabúgvið hjá Arnbjørn Gudleikssyni at gera, men hoyrdi til eitt annað skifti, nevniliga skiftið eftir Sjúrð hjalt í Bergen.

Hetta málið kundi tó ikki avgreiðast í Føroyum, tí Landslógin ásetti, at hetta var eitt mál fyri rættardømið, har arvleggjarin doyði. Í hesum førinum má tað hava verið býartingið í Bergen, har faðir Guðrunar búði, og endamálið við transskriptabrævinum má hava verið at upplýsa málið til hetta tingið sum kanningarmyndugleika. Transskriptabrævið frá 1407 sýnir tí, at Føroyar um hetta mundið ikki longur vóru eitt rættardømi, sum saman við Hetlandi lá undir Gulatingi, men eitt egið rættardømi, sum var ein fullfíggjaður liður í tí norsku rættarskipanini.

Hvussu málið endaði, og hvør, ið til síðst sat eftir við ognunum hjá Sjúrði hjalt, millum annað á Bryggjuni í Bergen, er ikki greitt. Men úr skjølum, sum eru varðveitt í Lübeck, vita vit, at í 1414 keyptu hanseatar seg inn í Finngarðin á

Bryggjuni og fóru at reka handilsvirksemi har (Helle, 1982, ss. 231, 244; Øye, 1998, ss. 46, 49, 77 (nota 31)).[3]

## Niðurstøða

Í greinini er roynt at greina málið, sum verður umrøtt í einum transskriptabrævi, sum varð gjørt á løgtingi í Havn tann 3. juli 1407, við at samanbera málsgongdina við Landslógina frá 1274. Eisini er kannað, um brævið stuðlar eini tilgiting, sum tað ósamanhangandi keldutilfarið úr eldri tíð hevur elvt til, nevniliga at Føroyar og Hetland í tíðini eftir at kongsstýrisskipan varð sett í verk umleið 1280 og fram til umleið 1360 vóru skipað sum eitt serstakt rættardømi undir Gulatingi við ferðandi løgmonnum haðani. Tilgitingin verður stuðlað av, at sambært innskrivingum í Kongsbókina varð altingið í Føroyum umskipað til eitt løgting eftir Landslógini eina ferð í tíðini millum 1350 og 1400.

Víst er á, at brøvini frá 1403-1405, sum eru avskrivað í transskriptabrævinum, verða endurgivin í evnislýsandi raðfylgju, og at hetta er gjørt fyri at fyrireika málið til viðgerð í einum øðrum rættardømi, eftir at tað var liðugt viðgjørt í tí føroyska rættardøminum. Málið snúði seg um veðhald við trygd í fastogn, sum ein kvinna í Hetlandi hevði arvað eftir bróðurdóttur sína, Guðrun Sjúrðardóttur í Føroyum, sum hevði arvað ognirnar og skuldina eftir mann sín í Húsavík, Arnbjørn Gudleiksson, eftir at børn teirra fyrst høvdu arvað og vóru deyð. Arvingi Guðrunar, Ragnhild Hávarðsdóttir í Hetlandi, tykist at hava tvíhildið um, at tann parturin av arvinum, sum hevði verið serogn hjá bróðurdótturini, ikki var skuldarbundin av veðhaldinum hjá manni hennara, tí henda partin hevði bróðurdóttirin arvað frá faðir sínum, Sjúrði hjalt, sum búði í Bergen. Eftir Landslógini skuldi avgerð um henda partin av málinum søkjast í rættardøminum, har arvleggjarin til serognina hjá bróðurdótturini var deyður.

Saman við øðrum ábendingum í innihaldinum, millum annað um, hvussu kvinnur kundu gera seg galdandi í rættarskipanini, sýnir transskriptabrævið við tí evnislýsandi skipanini, at í byrjanini av 1400-talinum vóru Føroyar eitt egið rættardømi í Gulatings løgdømi. Brævið stuðlar ikki tilgitingini um løgmanssamband millum Gulating, Hetland og Føroyar í 1300-talinum, men navnatilfarið í brævinum bendir á, at skyldskapur var millum Guðrun Sjúrðardóttur og ein løgmann á Gulatingi í 1383. Eisini sýnir brævið, at í 1403 umboðaði ein hetlendingur fæhirða kongs í Føroyum, helst sum fúti.

[3] Upplýsingin um Finngarðin er soljóðandi: “unam stubam, duas bodas, lym et clef et omnes partes ad predictra habitacula in schuttinghesstoven et elthusen in Fingarden Bergis Norwegie situatas appertinentes. (one living room, two storerooms, loft and bedroom, and all parts pertaining to the above mentioned houses in the common room and the cookhouse, situated in the tenement of Finnegården in Bergen)”.

## Bókmentir

Bjørkvik, H., & Salvesen, H. (2024). *Erlend Filippusson (i Store norske leksikon på snl.no)*. Norsk Biografisk Leksikon. https://snl.no/Erlend_Filippusson

Debes, H. J. (1995). *Føroya søga 2*. Føroya Skúlabókagrunnur.

DN. *Diplomatarium Norvegicum.* (C. C. A. Lange & T. Ulset (Eds.)). P.T. Malling.

Hammershaimb, V. U. (1891). *Færøsk anthologi* (J. Jakobsen (Ed.)).

Helle, K. (1982). *Kongssete og kjøpstad : fra opphavet til 1536* (Vol. 1). Universitetsforl.

Jakobsen, J. (1907). *Diplomatarium Færoense, Føroyskt fodnbrævasavn.* (2. útgáva). Emil Thomsen 1985.

Jakobsen, J. (1972). *Færøske folkesagn og æventyr* . H. N. Jacobsen.

Mortensen, A. (2021). Kongsumsiting, skattur, líkningareindir og fólk í tí føroyska skattlandinum umleið 1300-1600. *Fróðskaparrit*, *67*, 36–80.

Mortensen, A. (2023). *Kongsbókin og lógir føroyinga í hámiðøld*. Fróðskapur, Faroe University Press.

Øye, I. (1998). *Medieval fires in Bergen - revisited: Vol. no. 6*. Fagbokforl. https://boap.uib.no/index.php/bryggen/issue/view/397/60

Smith, B., Ballantyne, J. H., Council, S. (Skottland), & (avis), S. T. (1999). *Shetland documents 1195-1579*. Shetland Islands Council & Shetland Times.

Storm, G. (Ed.). (1888). *Islandske Annaler indtil 1578 / udgivne for det norske historiske Kildeskriftfond ved Gustav Storm*. Christiania : Grøndahl.

Sunde, J. Ø. (2020). Lagmannen og Landslova - Lagmannen i norsk mellomalterrettshistorie frå slutten av 1100-talet til 1400. In A. C. K. A. S. Horn (Ed.), *Lov og lovgivning i middelalderen. Nye studier av Magnus Lagabøtes landslov* (pp. 164–211). Nasjonalbiblioteket. https://issuu.com/nasjonalbiblioteket/docs/nota_bene_14_layout_issuu__1_

Vrieland, S. (2017). *Husevigsbrevene - et middelalderligt færøsk diplom*. https://haandskrift.ku.dk/motm/husevigsbrevene/